# Tann gátufulla flogvanlukkan

**Tann 14. august í fjør datt eitt ferðamannaflogfar niður nærhendis Athen, men enn tann dag í dag er vanlukkan ein gáta.**

Hvat var tað, sum veruliga hendi, tá Helios-flogfarið av slagnum Boeing-737 datt niður fyri einum ári síðani? Tað spyrja nógvir grikkar framvegis, og eingin tykist hava nakað veruligt svar.

Vanlukkan er vorðin ein gáta og ein tann mest merkisverda í flogsøguni.

Vanlukkan er eisini umrødd sum tann mest óhugnaliga nakrantíð. Í meiri enn tveir tímar fleyg flogfarið við sjálvstýraranum og við einum grikskum jagaraflogfari undir hvørjari lið, til tað datt niður einar 40 kilometrar norðan fyri Athen. Øll tey 121, sum við vóru, doyðu, og bjargingarmenn greiddu frá, at fleiri av líkunum vóru beinfryst, tá teir komu fram á tey.

Tey avvarandi hava funnist hvassliga at myndugleikunum, tí tvey av ferðafólkunum eru ikki funnin enn. Seinasta vikuskiftið funnu rannsóknarmenn likamslutir av einum ferðafólki niðri í einari gjógv saman við einum petti av øðrum flogvonginum. Men framvegis er einki funnið av teimum báðum seinastu.

Í gjár vóru fleiri hundrað avvarandi komin saman uttan fyri eit kapell, sum er bygt á vanlukkustaðnum til minnis um tey, ið fórust við Helios-flogfarinum. Talsfólk teirra søgdu, at tey bíða í spenningi eftir einari almennari frágreiðing um vanlukkuna. Myndugleikarnir siga, at hon kemur í næsta mánað. Tey avvarandi halda, at tey hava bíðað alt leingi eftir frágreiðingini, og tey siga seg vænta, at onkur verður drigin til svars fyri tað, sum hendi.

### 0Funnið orsøkina

Ein kanning, sum griksku loftferðslumyndugleikarnir hava gjørt, bendir á, at lufttrýstið inni í flogfarinum fall, og at teir báðir flogskipararnir tí mistu vitið. Tað kann vera rætt, tí í hvussu er svaraði flogfarið ikki, tá tey bæði jagaraflogførini róptu á tað, og flogskipararnir á jagaraflogførunum søgdu, at annar flogskiparin í ferðamannaflogfarinum lá fram eftir rommum, og at hin var ikki at síggja. Nógv bendir eisini á, at eitt av hinum starvsfólkunum umborð á flogførunum royndi at fáa tað aftur á beina kós, men til fánýtis.

Akrivos Tsolakis, sum stendur fyri kanningunum, hevur sagt við grikskar fjølmiðlar, at vanlukkan er tann mest merkisverda, sum hann nakrantíð hevur kannað. Kortini sigur hann sigur seg hava funnið orsøkina til vanlukkuna, men at svarið má bíða til í næsta mánað.

Við AFP-tíðindastovuna sigur Tsolakis, at frágreiðingin hjá kanningarnevndini fer at hava fleiri broytingar við sær í altjóða flogferðsluni. Hann ásannar, at lufttrýstið inni í flogfarinum fall, men sigur, at tað vóru fleiri orsøkir til tað. Júst hvørjar fáa vit ikki at vita fyrr enn í næsta mánað.




Vika 33

# Amerikanska rentan ikki hækkað

MARKNAÐARRÁK

Mest avgerandi hendingin í farnu viku var týskvøldið, tá amerikanski tjóðbankin, Fed, hevði rentufund. Fyri fyrstu ferð síðan 2004 varð rentan ikki hækkað. Hon er nú 5,25%. Fed tekur atlit til bæði prís- og búskaparvøkstur í rentuavgerðunum. Tá hesi bæði hækka, hækkar Fed vanliga rentuna, og øvugt tá tey lækka. Orsøkin til, at rentan var verðandi á 5,25% er, at amerikanski búskapurin vísir tekin um at slakka eitt sindur av, meðan Fed heldur, at prísvøksturin ikki er ein hóttan í løtuni. Flestu íleggjarar høvdu væntað óbroytta rentu, og tí ávirkaði hetta hvørki lánsella partabrøv nakað serligt. Óvissan um hvat fer at henda við rentuni elvir til sveiggj á virðisbrævamarknaðunum komandi vikurnar.

### Lánsbrævarentur hækkaðar

Hesa farnu vikuna hækkaði danska 10-ára rentan á leið 0,10%-stig, til 4,04%. Sum fastir lesarar vita, er lítið hent á lánsbrævamarknaðinum seinastu 4-5 mánaðirnar. 10-ára rentan hevur sveiggjað millum 3,9%-4,2%, og enn eru eingi greið tekin um, at hon av álvara fer at flyta seg.

### Framvegis góðir roknskapir

Danske Bank kunngjørdi hálvársroknskapin í farnu viku. Úrslitið var merkt av framgongd í netto rentuinntøkunum orsakað av útlánsvøkstri og aftfurføringum. Roknskapurin minkar um váðan við Danske Bank partabrævinum. Tískil setir Kaupthing tilmælið á Danske Bank til keyp.

Nú útvið 75% av norðurlendsku virkjunum hava kunngjørt roknskap, hava úrslitini áðrenn skatt í miðal verið 3,4% omanfyri okkara metingar og tey eru hækkaði 26,6% seinasta árið. Sølan hevur verið sum væntað, og er hækkað 10,4%. Samanumtikið hava roknskapirnir tí verið góðir.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna verður størstur dentur lagdur á prísvakstrartøl úr bæði USA og Evropa. Um tey gerast hægri enn væntað, tálmar tað væntandi bæði láns- og partabrøvum. Haraftrat verða eyguni havd við, um friðurin heldur í Libanon.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 585,67 | 0,8% |
| JPY | 5,03 | -0,4% |
| GBP | 1.106,74 | -0,1% |
| NOK | 93,25 | -1,4% |
| SEK | 81,11 | -0,2% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,54 | -0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 108,21 | 0,1% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 553,00 | -2,6% |
| KB Trygg Eurostoxx | 103,58 | 0,3% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir